## Blómur á bókasavni

Í hesum døgum sýnir Føroya Landsbókasavn tekningar av føroyskum blómum, sum listamaðurin Bárður Jákupsson hevur teknað. Hetta eru tekningarnar, sum eru í Litfloruni, sum Fróðskaparfelagið gav út í 1981. Felagið hevur nú latið Landsbókasavninum tekningarnar í varðveitslu, og í tí sambandi heldur Anna Maria Fosså almennan fyrilestur á savninum hóskvøldið 24. mai kl. 20 um evnið „Føroyskar blómur 2015“.

## Fiskimenn í øðini

Teir, sum sigla við ídnaðarskipunum í Esbjerg, eru í øðini, nú ES-nevndin hevur givið skipunum boð um at gevast við at royna eftir nebbasild. Veiðibannið kom í gildi síðstu nátt, og frágreiðingin hjá nevndini er, at sambært fiskifrøðingunum er stovnurin stak illa fyri. Tað skilja fiskimenninir ikki. Teir vísa á, at í seinastuni hava skip fingið upp í eini 500 tons um samdøgrið, og tað boðar ikki júst frá, at eingin nebbasild er til, siga fiskimenninir.

# afundi

í januar komandi, meðan skipið helst kann setast í sigling í 2009.

### Sjúkraflutningurin

Eitt mál, ið arbeitt hevur verið við í eina tíð nú, er tilhald fyri eldri. Kommunan ognaði sær í fjør vár eini sethús, sum við ávísum ábøtum og umbygging verður hildið væl egnað til endamálið.

Eisini skal heimahjálpin hava skrivstovu í húsunum umframt goymslu, og hartil skulukommunulæknarnireisini hava hølið í húsunum.

Og júst kommunulæknarnir saman við sjúkraflutninginum fingu nógva umrøðu. Skipanin sigur, at kommunulæknarnir upp á skift skulu vitja í Nólsoy aðruhvørja viku, men hetta hevur víst seg at virka serdeilis illa, tí fleiri kommunulæknar yvirhalda ikki hesa avtaluna. Hetta er tó nakað, sum kommunulæknafelagið hevur lovað at fingið í rættlag.

Somuleiðis var tosað um sjúkraflutningin. Avtalan við bátarnar hjá Skipasmiðjuni varð søgd upp í 2005, og síðani skuldi tyrlan taka sær av øllum sjúkraflutningi uttan fyri dagtímarnar. Nú er gamla avtalan tó fingin í lag aftur, og tað er ein tryggleiki, tí ikki altíð eru flúgvilíkindi hjá tyrluni.

### Ung í arbeiði

Skúlin fekk eisini nakað av umrøðu og víst var á, at við nýggja barnagarðinum, sum verður mettur at vera eitt stórt prýði fyri bygdina, er skúlin vónleyst avoldaður og treingir til stórar ábøtur.

Víst var serliga á, at serstovurnar eru ikki nútímans eins og fimleikahøllin ikki kann nýtast til nakað sum helst, tí hon er alt ov lítil.

Svimjihylurin fekk eisini umrøðu, og víst var á, at um tað ikki eydnaðist at fáa hann innilokaðan sum skjótast, er stórur vandi fyri, at tað, sum higartil er gjørt, fer fyri skjeyti. Róð hevur eisini verið upp undir, at kommunan yvirtekur verkætlanina, so hylurin kann fáast liðugur.

Ætlanin er eisini at gera nógv burtur úr tiltakinum ung í arbeiði. Hetta er tiltak ætlað at aktivera ungdómar frá 14 ár og uppeftir. Tvær milliónir eru settar av í ár, og ætlanin er at aktivera enn fleiri enn tey 200, sum tóku lut í fjør. Í Nólsoy verður hugsað um at gera ábøtur á gøtuna út á Borðuna sum ein møguleiki.

Tosað var eisini um onnur ting, eitt nú girðing um fótbóltsvøllin, møguleiki fyri tyrlupalli, leysgangandi hundum – og endaði Ronald Poulsen við at greiða frá ætlanunum um nýggja kloakkskipan í Nólsoy.



*Randi Frederiksberg hevur staðið fyri samskipanini av ferðavinnuætlanunum í Nólsoy*




*Soleiðis sær uppskotið til útstykking í Nólsoy út. Sum sæst á kortinum verður møguleiki eisini fyri randarhúsum. Viðmerkjast skal, at uppskotið ikki er endaliga samtykt*

# Stór útstykking klár í Nólsoy

**Nýhugsan við møguleika fyri randarhúsum liggur í kortunum í sambandi við nýggja stóra útstykking í Nólsoy**

BORGARAFUNDUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað bleiv lagdur stórur dentur á, at tað hevði skund at fáa ætlaðu útstykkingina avgreidda, so fólk kunnu seta spakan í sum skjótast.

Málið hevur ligið leingi á láni, og tað munnu vera eini tjúgu ár í minsta lagi, síðani eitt kommunalt grundstykki var til keyps í Nólsoy. Bygdarráðið, sum sat undan samanleggingini, hevði annnars gjørt arbeiðið við útstykking av nýggju grundstykkjum so gott sum liðugt, men eftir at samanleggingin varð veruleiki, er málið staðgað meiri ella minni upp.

Men nú hevur so umsitingin hjá Tórshavnar Kommunu gjørt nýtt uppskot um útstykking, og varð hetta lagt fyri bygdarfólkið á borgarafundinum, sum býráðið skipaði fyri úti í Nólsoy í gjárkvøldið.

Talan er um tíggju vanlig grundstykkir, sum eru millum 400 og 500 fermetrar. Vegur til útstykkingina er gjørdur, men enn vantar tó at seta upp gøtuljós, umframt kloakering og vatnleiðing, sum eisini skal leggjast í vegin. Hinvegin verður ikki mett serliga neyðugt við gongubreyt, tí hóast tað er vanligt og kravt til útstykkingar aðrastaðni í kommununi, so er tað hóast alt Nólsoy, talan er um her.

### Rímiligari prísir

Við í uppskotinum er eisini gjørdur møguleiki fyri randarhúsum, og hetta er nýhugsan úti í Nólsoy. Gamaní eru nakrar gamlar samanbygdar lonir í bygdini, men beinleiðis rað- ella randarhús er ikki roynt fyrr.

Hetta verður tikið við sum ein møguleiki, tí enn er ikki nøkur kanning gjørd av, um áhugi yvirhøvur er fyri slíkum húsum.

Men tey eru so tikin við í ætlanina, og innteknað í skitsuverkætlanina eru tíggju raðhús løgd á ogn hjá kommununi, umframt fýra onnur, sum eru teknað á jarðarteig, sum Føroya Jarðarráð eigur. Hesi grundstykki eru 260 fermetrar hvørt.

Upplýst var á fundinum, at vanligur prísur fyri grundstykkir í kommununi er 6.000 krónur fermeturin, men hetta verður ógvuliga trupult at krevja úti í Nólsoy, tí tað hevði merkt ein prís millum 200.000 og 300.000 krónur. Roknað verður við, at prísurin í staðin fer at liggja um helvtina av hesum, ella áleið 150.000 krónur.

Fundarfólkið legði annars stóran dent á, at tað var alneyðugt, at skjótt verður borið at nú, tí bíða hevur verið alt ov leingi eftir møguleikanum at seta búgv í oynni. Víst var á fleiri dømir, har ungfólk stutt sagt vóru farin aðrastaðni at seta búgv, tí tey tímdu ikki at bíða meiri.

Annars var upplýst, at í minsta lagi tvey pør standa á bíðilista, og hesi vildu vita, um tey kundu vænta nakað í bræði, ella tey skuldu søkja aðrar leiðir.

Tað var Michael Viderø, iði greiddi frá ætlanunum um útstykkingina og hann segði, at tað væntandi verður klárt hjá fólki at seta spakan í um ársskiftið.